B36-B68 2-1 (0-0):

B36 heldur fast

Við sigrinum á B68 gjørdu B36 mest sum greitt, at tær helst eru einasti avbjóðarin hjá KÍ í bestu kvinnudeildini

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað hevur verið sagt í alt ár, at um nakar avbjóðari skuldi finnast til KÍ-kvinnurnar, so mátti hesin koma úr antin B36 ella B68. Júst hesi bæði liðini tørnaðu saman í Havn sunnudagin, og fyri báðar partar var tað greitt, at eitt tap her vildi viðføra, at seinasta lítla FM-vónin varð slept.

Tað gjørdist B36, vann dystin, og í so máta má sigast, at tær nú eru einasti veruligi avbjóðarin, og tað hoyrir eisini til søguna, at sigurin hjá B36 var fult uppiborin.

Máslúkur á beinkinum

Longu tíðliga í dystinum var greitt, at tað var B36, sum var betra liðið. Spæl teirra hekk væl betri saman enn hjá gestunum, men tó at tær høvdu fleiri møguleikar, so eydnaðist teimum ongan tíð at koma somikið nær, at talan gjørdist um mál.

Hinvegin vóru tær hjá B68 heldur ikki sørar, tó at tær vóru við undirlutan. Nakrar ferðir var av álvara vandi á ferð framman fyri B36 málinum, men tað gjørdist so ikki meira enn næstan.

Eftir at B36 vann heimadystin móti B68, mugu tær metast sum einasti veruligi avbjóðarin hjá KÍ
Mynd: Álvur Haraldsen

Hjá B36 hevur Ása á Neystabø veruliga gjørt vart við seg í ár, men hon var smáskadd undan hesum dystinum, og byrjaði tí á beinkinum. Men í steðginum var hon tó send at hita upp, og hetta skuldi vísa seg at verða ein heppin avgerð.

Leiðslumálið hjá B36 átti hon tó ikki part í. Maria Vang vann bóltin á miðvøllinum, eftir at málverjin hevði sparkað út, og so gekk tað bara ein veg. Kanska var tað ikki tann vakrasti solo-túrurin, tá hon taklaði seg ígjøgnum alla B68-verjuna, men úrslitið gjørdist, at Maria einsamøll við málverjanum kundi leggja B36 á odda.

Kom tað væl við hjá B36, at tær í steðginum fingu Ásu inn á vøllin, so var støðan øðrvísi hjá B68. Kanska týdningarmesti leikarin á liðnum, Oddvá Kristiansdóttir, kom ikki á vøllin til seinna hálvleik, men kortini fingu tær bart seg inn aftur í dystin. Útjavningin kom, tá eitt innlegg úr vinstra borði slapp at ferðast allan vegin í málið, og so stóð á gomlum nøglum hjá B36.

Tær fingu tó sigursmálið, tá Ása á Neystabø sýndi, hvussu ein áleypari eigur at bera seg at. Heldur enn at hyggja at, tá Arnbjørg Danielsen royndi seg við frísparki, var hon skjót at fylgja upp, tá málverjin ikki helt bóltinum, og so kundi hon prika avgerandi bóltin inn.

Skála-HB 0-4 (0-1):

HB klintrar uppeftir

Tó at tað leingi gekk javnt á, so vann HB ein tryggan sigur á Skála, og er havnarliðið nú spakuliga farið at klintra upp eftir stigatalvuni

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

HB hevði í grundspælinum eina ta lakastu úrtøkuna, sum tær nakran tíð hava havt í bestu kvinnudeildini. Eitt at kalla nýtt lið skuldi spælast saman, og tá hetta samstundis varð gjørt uttan fleiri av teimum leikarum, sum áður hava verið týdningarmiklir brikkar hjá liðnum, var tað sjálvsagt, at hetta kostaði nakað.

Í endaspælinum hevur tó gingið nakað frægari, og útisigurin á Skála staðfesti helst, at HB nú spakuliga er um at koma fyri seg. Nakað gullmerki verður tað valla til í ár, men kunnu tær bara vera við í stríðnum um okkurt slag av heiðurskrónum, so hava tær longu rokkið væl longri, enn roknað varð við frammanundan.

Leingi javnt

Tó at tað var HB, sum størsta partin av dystinum var við yvirlutan, so skuldi ganga rúm tíð, áðrenn tær fingu hol á.

Leikararnir hjá báðum portum vóru so smátt farnar at hugsa um hálvleikin, so eisini leikarin, sum legði upp til triðja málið, tá ein sending frá henni fann fram til Vivian Unadóttir, sum ikki hevði stórveis trupulleikar av at beina bóltin í málið.

Seinasta málið hjá HB skeyt Ása úr Dímun, tá hon var kvikast at reagera, eftir at Malan á Dunga hevði roynt seg við skoti.

Við sigrinum, hevur HB nú vunnið seg upp á triðja plássið í landskappingini, og einki er at ivast í, at tað er ein hampuliga hugalig støða hjá bæði leikarum og venjara, soleiðis at vera við í heiðursmerkjastriðnum, hóast liðið enn er í eini uppbyggingarfasu.

Máltindurin

Rannvá Andreasen	KÍ	11
Malena Josephsen	KÍ	8
Vivian Bjartalíð	Kí	5
Heidi Heinesen	GÍ	4
Eyðfríð Kristiansen	HB	4
Elsa Maria Simonsen	KÍ	4
Anja Weihe	B36	3
Arnbjørg Danielsen	B36	3
Ása á Neystabø	B36	3
Hansy Davidsen	B68	2
Eyðvør úr Dímun	HB	2
Jensa Sirdal	Kí	2

Støðan, 1. deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	KÍ	5	5 - 0 - 0	31	5	26	18
2	B36	5	4 - 0 - 1	12	7	5	14
3	HB	5	2 - 0 - 3	11	9	2	6
4	GÍ	4	2 - 0 - 2	6	17	-11	6
5	B68	4	1 - 0 - 3	7	10	-3	4
6	Skála	5	0 - 0 - 5	6	25	-19	0

KÍ-GÍ 13-1 (6-0):

Málrok í Klaksvík

KÍ-kvinnurnar halda enn beina kós móti triðja meistaraheitinum á rað. Um vikuskiftið fekk GÍ av at vita

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

GÍ fekk av at vita, at tá tær komu til Klaksvíkar sunnudagin. Longu tá farið var til hálvleiks, var støðan 6-0 til KÍ, og tá dysturin var blástur av, vóru ikki færri enn 12 mál á muni.

Sum skilst úr Klaksvík, so sigur úrslitið tað mesta av tí, sum sigast skal um dystin. Talan var um einvegis ferðslu úr enda í annan, og á GÍ liðnum mundu tær eina mest hugsa um, nær tíðin hjá dómaranum var runnin, soleiðis at sleppast kundi av vøllinum.

Við sigrinum halda KÍ kvinnurnar framhaldandi beina kós móti meistaraheitinum, og sum støðan er, er ilt at siggja, hvør kann steðga teimum. Gaman í hevur árið víst, at serstakliga B36 og B68 kunnu geva liðnum góða móstøðu, men hinvegin hava nógvir av sigrunum hjá KÍ verið somikið sannførandi, at tað er ilt at ímynda sær, hvussu annað av árstalsfelagunum skal kunna basa KÍ, umframt at sýna tann stabilitetin, sum krevst, um tær eisini skulu framvið oddaliðnum í samlaðu støðuni.

Hjá KÍ vóru málskjúttarnir sunnudagin: Rannvá Andreasen 5, Malena Josephsen 4, Vivann Bjartalíð 2, Elsa Maria Simonsen 1, Jensa Sirdal 1. Málið hjá GÍ skeyt Judy Justinunssen.

Rannvá Andreasen ávegis einum av sínum fimm málum sunnudagin. KÍ vann ein knúsandi 13-1 sigur, og heldur framhaldandi beina kós móti triðja meistaraheitinum á rað
Mynd: SáH

Príslækking á pappi og pappíri til endurnýtslu

Frá 1. september 2002 eru fylgjandi prísir galdandi fyri turt og reint papp og pappír til endurnýtslu.

Tilfar	kr/m3
Bara papp, heintað	90,00
Bara pappír, heintað	90,00
Blandað pappír og papp, heintað	120,00

- Pappír er tíðindabløð, vikubløð, tíðarrit, lýsingarbløð, kopipappír og annað reint pappír.
- Papp er pappeskjur og annað reint, turt og óviðgjørt bylgjupapp ella kartonpapp.
- Prísirnir eru fyri leyst papp og pappír. Leysprísurin verður faldaður við 3, um papp ella pappír eru samantrýst.
- Avtalað kann gerast um levering av pappi ella pappír.
- Meira fæst at vita um burturkast á www.irf.fo

IRF

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 1223, Atlantic Airways, Faroe Islands P/F, 380 Sørvágur.

Viðtøkur broyttar: 07.06.2002.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Jan Remi Hansen, 380 Sørvágur (Starvsfólkavaldur) og Annfinnur Frederiksen, 380 Sørvágur (Starvsfólkavaldur)
Innkomin í nevndina: Annika Jespersen, 380 Sørvágur (Starvsfólkavald) og Heini Viggo Davidsen, 380 Sørvágur (Starvsfólkavaldur).

Skráseting Føroya tann 22. august 2002

Kristin Balle

Assistentur

Søkt verður eftir avloysara fyri assistentin á Setursskrivstovuni á Fróðskaparsetrinum frá 15. sept. ella skjótast til ber. Starvið er tíðaravmarkað í eitt ár.

Uppgávur
- Post og telefonavgreiðsla.
- Bóking og umsiting av forskotskassa
- Skráseting og viðlíkahald av ymsum yvirlitum og uppgerðum
- Ljóstøka
- Ganga til handa

Førleikakrøv
Arbeiðið er sera fjølbroytt. Krøv verða tí sett til:
- røkjuskap
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- evni at samskifta og samstarva við onnur
- góðan málkunnleika
- góðan edvkunnleika

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið og lønt í flokki II.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Anniku Sølvará, setursskrivara, á telefon 352500 ella teldupostadressuni: annikas@setur.fo

Umsókn við avriti av prógvum, váttan um arbeiðsroyndir, viðmælum o.l. verður at senda setursskrivstovuni í seinasta lagi 9. september 2002.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J. C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
110 Tórshavn

Fróðskaparsetur Føroya er útbúgvingar- og granskingarstovnur, sum hevur triggjar deildir umframt Setursskrivstovuna. Setursskrivstovan er miðfyrisitingin hjá Fróðskaparsetrinum. Í løtuni starvast 8 fólk á skrivstovuni.

Sosialurin -tað loysir seg

Til sølu

Daihatsu Rocky 06/96.

Tlf. 447543

Fólk til matframleiðslu

Til skundverða framleiðslu okkara, sóknast vit eftir fólki til at byrja skjótast gjørligt.

Áhugað kunnu venda sær til P/F Poul Michelsen á telefon 31 46 50 og spyrja eftir Claus Mørkøre.

P/F Poul Michelsen

Sjálvsognarstovnurin ALV

Vaskifólk at vaska 10 tímar um vikuna.

Søkt verður eftir fólki at vaska hølini hjá ALV í Smiðjugerði 6 kj., at byrja sum skjótast.

Starvið verður sett sambært sáttmála við Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Upplýsingar um arbeiðið v.m. fáast við at venda sær til Sjálvsognarstovnin ALV- Guðrun.

Umsókn skal verða stovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin 11. sept. 2002 kl. 12.00.

Sjálvsognarstovnurin ALV
Postboks 301
110 Tórshavn
Tlf. 350070
Fax. 350071

Kokkur

Søkt verður eftir kokki til sølubúðina á Ternuni, sum siglir um Vestmannasund.

Trygdarskeið krevst og arbeitt verður í skiftivakt. Byrjast skal 1.9. 2002.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 211099